

Pyntan, stákan og veitslur eru á skránni, tá ið danska kongshúsið vitjar í 1907, 1921 og 1949



Bretar hertaka Føroyar, men tann friðarliga hertøkan fær eisini avleiðingar, 1940-45



Bretar hertaka Føroyar, men tann friðarliga hertøkan fær eisini avleiðingar, 1940-45



Frálíku upptøkurnar hjá Juliusi Høgnesen, apotekara, ið vitjar heimbygdina Oyndarfjørð í 1930.



Havnin veksur við vælferðini, og býurin broytist



Danskar og føroyskar modellir vísa fram nýmótans undirklæði á Hotel Føroyum í 1966.

# Nú koma Føroyskar Søgur á filmi

**Føroyskar søgur í 100 ár koma nú út á filmi. Kappróður á ólavsøku, vøksturin í fiskivinnuni, stórhvalaveiða og grindadráp, bretska hersetingin stríðsárini, kongavitjanir gjøgnum tíðirnar og mangt annað. Føroyskar Søgur siga frá stórum og smáum um tað, ið foreldur okkara og ommur og abbar hava upplivað í 100 ár**

SIÐSØGA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í morgin, fríggjadagin 19. september, koma Føroyskar Søgur út á filmi.

Í meira enn eitt ár hava framleiðarar og tilrættaleggjarar í filmsfelagnum Substanz Nordisk Film arbeitt seg ígjøgnum føroyska filmsskattin, ið umfatar eina røð av ómetaliga virðismiklum filmsperlum.

Nú er arbeiðið liðugt, og tilfarið kemur út á DVD-fløgu.

Kilometrar av filmi

Endamálið við innsavningini er verið at savna saman filmaðar løtur seinastu 100 árini, ið kunnu røkka inn í føroysku fólkasálina.

Nakrar høvuðskreftir í arbeiðnum eru miðlafrøðingurin og tíðindamaðurin, Uni Leitisstein, ið burturav hevur arbeitt við at samskipað verkætlanina. Sjónvarpsmaðurin og framleiðarin, Eyðstein Jacobsen, hevur klipt filmin, og Birgir Kruse, ritstjóri á Føroya Skúlabókagrunni, hevur hjálpt til við at savna inn film frá føroyingum. Per Højgaard, samskiftisráðgevi í Eik Banka, hevur staðið fyri samskipanini vegna Eik Grunnin.

Kilometrar av filmi úr almennum og privatum søvnum og nógv filmsklipp, ið púra vanligir føroyingar hava latið, eru grundarlagið undir Føroyskum Søgum, ið verða útgivnar bæði í Føroyum og í Danmark á føroyskum og donskum máli.

Upprunaligar upptøkur

Føroyskar Søgur eru samansettar av upprunaupptøkum. Søgulig ljóðbrot eru at hoyra saman við livandi myndunum, eins og upplestur av tekstum úr samtíðini krydda og undirbyggja filmsupplivilsið.

Innsavnaðu filmarnir eru fluttir yvir í talgilt – digitalt – format, so teir eru varðveittir í framtíðini. Eigararnir fáa upprunafilmarnar aftur saman við einum talgildum eintaki, og samstundis fær Kringvarp Føroya eitt talgilt eintak til sítt søguliga savn, so tilfarið eisini er til taks hjá søgufólki og øðrum áhugaðum.

Fólkslig verkætlan

Filmsverkætlanin er vorðin veruleiki við fíggjarligum stuðuli úr Eik Grunninum, ið er grunnurin aftan fyri Eik Banka.

- Tað heilt serliga við Føroyskum Søgum er, at hetta eru søgur frá føroyingum um føroyingar. Hetta eru upplivingar – bæði gerandis og til høgtíð. Júst hetta skuldi gjørt verkætlanina fólksliga, og onki er meira í tráð við siktið hjá Grunninum. Hetta er ikki tann almenna Føroya Søga og skal heldur ikki vera tað, sigur Frithleif Olsen, nevndarformaður í Eik Grunninum

Heiður og framíhjárættur

Framleiðarin hjá Substanz Nordisk Film, Troels Uhrbrand Rasmussen, heldur tað vera ein framíhjárætt at vera sloppin at arbeiða við Føroyskum Søgum.

- Ferð eftir ferð hava fólk latið okkum sín dýrabæra filmsskatt, og hetta hevur tí verið eitt heiðursarbeiði. Tað er ein stór gleði nú at kunna lata hesum fólkum eina lætt atkomiliga útgávu av filmstilfarinum, sigur Troels Uhrbrand Rasmussen.

Útgávudagur í morgin

Føroyskar Søgur koma alment út í Føroyum og í Danmark í morgin, 19. september.

Filmurin, sum er samansettur av 12 sjálvstøðugum filmspørtum, er í einari føroyskari og einari danskari útgávu.

Kostnaðurin er 199 krónur, og filmurin fæst til keyps í bókhandlum, Shell- og Statoilstøðum og einari røð av handlum kring landið. Harumframt kann filmurin keypast beinleiðis á hesari heimasíðuni: www.vildmedhistorie.dk.

Ein spildur nýggj heimasíða er gjørd í sambandi við verkætlanina. Hon eitur: www.foroyskarsogur.fo.